# Fýra línuskip landa á Kósini

**Fríggjadagin landaðu línuskipini, Kvik og Pison, á Kósini, og mánadagin koma Klakkur og Polarstjørnan. - Vit hava keypt hýsu og upsa á uppboðssølu, og tað hevur verið fitt av arbeiði á flakavirkinum. Enn er tó lítil gongd í saltfiskinum, tí so lítil toskur hevur verið á marknaðinum, sigur Egil Johansen**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*



*Fríggjadagin landaðu tvey línuskip á Kósini; mánadagin koma aftur tvey skip inn at landa. Hetta eru fyrsti túrarnir hjá fleiri av teimum størru skipunum eftir verkfallið, ið var*

Fríggjadagin landaðu línuskipini, Kvik og Pison, á Kósini í Klaksvík.

Egil Johansen sigur, at Kvik, sum hendan túrin var undir Íslandi, hevði eini 120.000 pund, meginparturin brosma. Pison, sum hevur roynt undir Føroyum, hevði eini 100.000 pund, harav meginparturin var hýsa.

Línuskipini, Klakkur og Polarstjørnan, koma ætlandi inn at landa mánadagin. Klakkur roynir norðanfyri, meðan Polarstjørnan er á Føroya Banka.

Egil veit at siga, at skipini høvdu ávikavist 60.000 og 50.000 pund miðskeiðis í hesi vikuni.

- So, hetta verður ivaleyst ein hampiligur túrur, tá ið skipini koma inn at landa mánadagin, sigur hann.

### Fyrstu túrarnir

Hetta er at kalla fyrsti túrur hjá fleiri av teimum størru skipunum eftir verkfallið, sum var á privata arbeiðsmarknaðinum.

Onkur av bátunum hevur verið á útlendska marknaðinum og selt - eisini fyrsta túrin eftir, at verkfallið var av.

Egil sigur, at nøkur av skipunum, sum plaga at landa til virkið, eru ikki í vinnu beint nú.

- Jákup B liggur; teir skifta brúgv, og Núpur er uttanlands, har ymiskt verður gjørt við skipið, sigur hann.

### Lítil toskur

Á Kósini hava tey arbeitt alla hesa vikuna.

- Vit hava keypt hýsu og upsa á uppboðssølu, og tað hevur verið fitt av arbeiði á flakavirkinum. Enn er tó lítil gongd í saltfiskinum, tí enn hevur so lítil toskur verið á marknaðinum, sigur Egil Johansen.

# 120 fólk arbeiða hvønn dag í Vestmanna



*120 fólk arbeiða upsa á portiónsvirkinum hjá Føroya Fiskavirking í Vestmanna, og nóg mikið hevur verið at gjørt, síðan verkfallið var av*

**Mikudagin landaðu Vestmenningur og Fram í Vestmanna. Skipini vóru full undir lúkurnar, men upsin var rættiliga smáttfallandi. Meira enn helmingurin av veiðini hjá trolarunum var upsi 4**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Á virkinum hjá Fiskavirking í Vestmanna hava tey arbeitt at kalla hvønn dag, síðan verkfallið var av.

Skipað hevur verið soleiðis fyri, at virkið hjá Fiskavirking í Saltangará hevur verið minni virkið hesa tíðina, nú minni fiskur er komin uppá land, og hetta er so komið teimum til góðar, sum arbeiða fisk í Vestmanna.

### 120 fólk

Fiskavirkið í Vestmanna er eitt portiónsvirki burtur av, sum framleiðir portiónir úr upsa.

Arbeitt verður við tveyskiftivakt burtur av, og tilsamans arbeiða eini 120 fólk á virkinum.

Nakað av toski og øðrum fiskasløgum kemur upp í Vestmanna, tá ið skipini landa, men hesin fiskurin fer til onnur virki. Eitt nú endar toskurin og longan á saltfiskavirkinum hjá Fiskavirking á Toftum.

### Full skip

Miðskeiðis í hesi vikuni landaðu Vestmenningur og Fram í Vestmanna. Skipini vóru full undir lúkurnar. Veiðan vá umleið 250.000 pund. Meginparturin av veiðini var upsi, nøkur fá tons toskur og eitt sløð av øðrum fiskasløgum.

Upsin hjá trolarunum var rættiliga smáttfallandi.

Á virkinum í Vestmanna siga tey, at meira enn helmingurin av veiðini hjá skipunum var upsi 4, og tað er rættiliga smáur fiskur.

- Upsin hevur eisini verið rak nú eftir gýtingina í vár, men hann er nú á veg uppeftir aftur í fiti.

### Niðurfyri

Í Vestmanna vita tey ikki, hvussu komandi vika fer at roynast, men fríggjadagin væntaðu tey, at nóg mikið av fiski var niðurfyri til ein part av mánadegnum.

- Vit vóna og vænta, at onkur landing verður í komandi viku eisini, siga tey.

Umframt fiskin hjá Vestmenningi og Fram, hevur Fiskavirking í Vestmanna eisini keypt nakað av fiski frá P/F Beta í Saltangará.

# ítróttur

Nr. 120 • leygardagur • 28. juni 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Helgi ikki við í Gundadali

**Jákup á Borg hevur ikki vant í vikuni, men teir í B36 vóna, at hann verður førur fyri at spæla ímóti NSÍ**

B36–NSÍ
*Jóannes Hansen*



*Helgi L. Petersen NSÍ verður ikki við í dystinum móti B36 í Gundadali sunnudagin. Hinvegin er tað ivasamt, um Fróði Clementsen klárur aftur, eftir at hann sat uttanfyri móti KÍ við einum skaða*

Tað eru tvey lið sum seinast fingu fult, ið hittast í Gundadali í morgin. B36 so hølvaði KÍ av sunnudagin, og mikukvøldið fekk NSÍ øll stigini á Skála, har tað tó í fyrra umfarinum gekk rættuliga striltið hjá teimum í Runavík.

Í B36 er fótbóltslagið sjálvandi sera gott, eftir at teir vunnu 7–1 á KÍ. Eftir rættuliga trilvandi fyrstu umførini hava teir tvær tær síðstu ferðirnar fingið seks stig við málmuninum 11–2.

Tað ber neyvan til at ímynda sær eina betri gongd enn tað.

Takið hjá B36arunum er tískil at halda bæði beinini á jørðini.

– Tað er alneyðugt, um vit skulu hugsa um at vinna á NSÍ. Vit hava eina ferð fyrr í ár vunnið 7–1 á KÍ. Eftir tann sigurin hilnaðist tað illa í landskappingini, har vit taptu EB/Streymi og B68 og akkurát vunnu 1–0 á Skála, minnast teir í B36 og vísa harvið á, hvussu skjótt tað kann ganga hvønn vegin í fótbólti.

Mikukvøldið skal B36 spæla útivdyst ímóti HB, og tað hevði sjálvandi verið rættuliga hugaligt hjá teimum at havt feskan sigur á NSÍ í viðførinum, tá ið teir skulu hitta grannarnar.

Fróði Clementsen var ikki við ímóti KÍ, og tað er rættuliga ivasamt, um hann verður við ímóti NSÍ. Hann hevur ikki vant í vikuni.

Jákup á Borg hevur heldur ikki vant í vikuni. Hann hevur trupulleikar við hælinum. Um støðan í morgin verður, sum hon var í gjár, so verður hann ikki førur fyri at spæla. Men teir vóna, at hann verður so mikið frægur, at hann kortini verður førur fyri at spæla.

### Kosta nógv

Í NSÍ hava teir ikki verið heilt nøgdir við úrtøkuna higartil í ár. NSÍ hevur ikki tapt enn, men tað hevur kostað teimum nógv stig, at teir fýra ferðir eru farnir av vøllinum við javnleiki. Eitt nú mistu teir sigurin evstu løtu síðsta sunnudag á Eiði.

Kári Hansen var á miðvøllinum á Skála mikukvøldið, men hann noyddist at gevast fimm minuttir undan steðginum, og tað er ivasamt, um hann verður førur fyri at spæla í morgin. Harafturímóti er tað víst, at Helgi L. Petersen ikki verður við ímóti B36. Hann skal av landinum í próvtøkuørindum. At Helgi ikki verður við kemur illa við hjá NSÍ. Eftir eitt sindur ivasama byrjan hevur tað gingið rættuliga væl hjá Helga síðstu ferðirnar. Eitt nú skoraði hann tvey mál á Skála mikukvøldið.

Christian Høgni Jacobsen hevur ikki verið hundrað prosent síðani 1–1 dystin ímóti B68. Ta ferðina noyddist hann at taka seg aftur í 2. hálvleiki, og hann hevur ikki vant við fullari ferð síðani tá. Men tað er rættuliga sannlíkt, at NSÍ í morgin fer at hava Christian Høgna Jacobsen í álopsplássinum, sum stendur tómt, nú Helgi L. Petersen verður burturstaddur.

# Alt stendur upp á spæl í Vági

**Felags fyri vágbingar og skálamenn er, at teir ikki hava fingið mál, tá ið teir hava spælt seg til upplagdar møguleikar**

VB–SKÁLA
*Jóannes Hansen*

Jóansøka er á Tvøroyri hetta vikuskiftið. Ítróttarliga verður størsti spenningurin sunnudagin ikki á Tvøroyri, men í Vági, har Skála fer at vitja. Enn er kappingin ikki so gomul, at tað ber til at tosa um lagnudystir og harvið um, at tann, sum ikki fær stig, er fokin. Men støðutalvan boðar frá, at tað hevur rættuliga stóran týdning, hvør fær stig á Vágseiði í morgin.

Skálamenn eru framvegis sørir. Teir hava einki stig, og um teir tapa, so verður VB fimm stig frammanfyri teir. VB hevur tvey stig, og um teir tapa, so verður gloppið upp til áttanda plássið so stórt, at tað ikki fer at verða møguleiki at vinna tað aftur í einum og tveimum dystum. Ikki minst eftir at EB/Streymur og FS Vágar hesar seinastu dagarnar hava fingið fult.

Felags fyri bæði VB og Skála er, at leikliga avrikið í seinastu royndunum á heimavølli ímóti oddaliðum hevur verið so mikið gott, at teir harmast um, at tað ikki eydnaðist at fáa stig. VB trýsti HB, og vágbingar høvdu fleiri góðar møguleikar – eitt nú misnýttu teir brotsspark – men tað var HB, sum vann 3–2 og harvið fór við øllum stigunum.

Skála hevði mikukvøldið vitjan av NSÍ, sum vann 3–1. Á Skála siga teir, at í 1. hálvleiki høvdu teir fýra púra upplagdar møguleikar, sum teir einki fingu burturúr, meðan NSÍ fekk tvey mál burturúr einum møguleika!

Spurningurin er so, um tað ber til at gera nakað fyri at venda vánaligu úrtøkuni.

### Eitt ivamál í part

Vágbingar hava ikki havt ikki hildið seg havt nóg stóra tyngd á beinkinum. Tí høvdu teir seinast Jón Paula Olsen, sum í fjør boðaði frá, at hann fór at gevast í 1. deild, á beinkinum. Venjingarstøðan hjá honum er ikki so galin, tí hann hevur ábyrgdina av 2. deildar liðnum.

Ivamálið hjá VB er heldur í hinum endanum. Sera týdningarmikli miðverjin, Eyðun Jacobsen, er so mikið plágaður av beinskaða, at hann hevur vant lítið í vikuni. Mikukvøldið varð hann noyddur at gevast, og hósdagin vandi hann ikki.

Á Skála er næstan sama fólkið tókt, sum spældi ímóti NSÍ mikukvøldið. Undantakið er Arnhold Berg, sum er leikbannaður. Ímóti NSÍ var Sveinur Justinussen ikki við. Hann hevur ikki vant, síðani hann ímóti KÍ noyddist at gevast orsaka av fótliðsskaða, og tað er lítið sannlíkt, at hann verður tøkur í morgin. Íslendingurin Pétur Geir Svavarsson, sum var á Skála og royndi seg, er farin til hús aftur. Mikukvøldið var Heini Kristiansen í málinum. Í gjár var ikki greitt, um tað verður hann ella Eugen Voda, sum fer at verja Skála málið á Vágseiði.

# AB skal steðga ÍF

**Um fuglfirðingar ikki heilt skulu stinga av frá hinum, so er neyðugt hjá argjamonnum at steðga sigursrøðini hjá ÍF**

2. DEILD
*Jóannes Hansen*

Higartil hevur einki verið at rafla um í næstbestu deildini. Eftir at teir trý tey seinastu árini ikki hava verið serliga sannførandi í 2. deild, tykjast fuglfirðingar at hava sett beina kós ímóti bestu deildini, sum teir fluttu niður úr í 1999. Eftir seks tey fyrstu umførini hava teir átjan stig, og teir eru sjey stig undan næstu kappingarneytunum.

Millum kappingarneytarnar er AB. Seinnapartin í dag skal ÍF spæla á Argjum. Fuglfirðingar skipa fyri bussferð til Argir.

Sumba er á stigatalvuni undir liðini á AB. Sumbingar halda jóansøku á Krossinum, har teir næstbestu hjá B68 vitja. B68 er niðast í 2. deild.

TB spælir í kvøld jóansøkudyst ímóti VB. Talan er um teir bestu á Tvøroyri ímóti teimum næstbestu úr Vági. Fyri TB, sum er á fjórða plássinum við tíggju stigum, hevði tað kenst eyðmýkjandi at mist stig ímóti næstbestu vágbingunum. Men støðutalvan vísir, at VB eigur eitt gott 2. deildarlið. Teir hava – eins og TB hevur tað – tíggju stig.

B71 liggur eitt sindur tungt í sjónum. Teir skulu vitja í Klaksvík, har 2. deildarliðið ikki hevur verið so bragdligt, sum tað onkuntíð hevur verið fyrsta partin av kappingini. LÍF fær vitjan av B36, sum heldur ikki hevur staðið seg so væl, sum teir plaga at gera undan summarfrítíðini.